# Norðskála-Oyrar skúli 40 ár

**Alment hátíðarhald verður í Norðskála-Oyrar skúla sunnudagin, har millum annað filmur og útvarpsbrot frá sjálvari vígsluni verða sýnd fram, umframt annað forkunnugt**

HÁTÍÐARHALD

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Sunnudagin savnast núverandi og gamlir næmingar eins væl og onnur áhugað til hátíðarhald í Norðskála-Oyrar skúla*

*Mynd: skular.sunda.fo*

Í hesum døgum eru 40 ár liðin síðani Norðskála-Oyrar skúli varð vígdur. Í tí sambandi verður skipað fyri almennum hátíðarhaldi sunnudagin klokkan 16.00, har nógv forkunnugt og spennandi er á skránni.

Millum annað er eitt næmingayvirlit gjørt, ið vísir, at 329 næmingar hava gingið í Norðskála-Oyrar skúla. Hetta sama yvirlit vísir eisini, hvar gomlu næmingarnir búgva í dag og hvat teir starvast við.

Av øðrum forkunnugum er bæði sjónvarps- og útvarpsbrot, umframt gamlar myndir. Eisini hava fyrireikararnir fingið hendur á gomlum protokollum, ið føra smá 100 ár aftur – protokollir frá gamla Oyrar skúla og Norðskála skúla.

Tað var annars 1. september í 1968, at Norðskála-Oyrar skúli varð vígdur. 40 ár seinni skal hetta hátíðarhaldast. Næmingarnir í Norðskála-Oyrar skúla hava longu hátíðarhildið dagin einaferð. Mánadagin 3. september skipaði skúlin fyri hátíðarhaldi fyri børnunum. Hetta gjørdu tey millum annað við at ganga skrúðgongu frá teimum gomlu bygdarskúlunum á Oyri og við Norðskála, og annars hugnaðu børn og lærarar sær saman.

Nú sunnudagin verður tað heila eitt sindur øðrvísi. Fyrireikararnir siga seg vóna at savna gamlar næmingar og avvarðandi, umframt onnur, ið hava áhuga fyri tiltakinum.

**Skráin er henda:**
- Filmur frá vígslu skúlans
- Brot úr útvarpssending, tá skúlin varð vígdur
- Framsýning við gomlum skúlamyndum
- Hugleiðing um skúlatíðina tá
- Næmingayvirlit yvir hesi 40 árini
- Kaffi og køkur

# Badminton í hálva øld

TÍÐINDASKRIV

Havnar Badmintonfelag hátíðarheldur í vikuskiftinum 50 ára dagin hjá felagnum. Tað verður gjørt við skrúðgongu, framsýning og veitslu. Fyrrapartin er ein innanhýsis kapping og klokkan 14 er alment hátíðarhald í badmintonhøllini, har borgarstjórin, Heðin Mortensen, heldur røðu.

Fyrsta stigini at spæla badminton í høvuðsstaðnum vórðu tikin í 1957, tá teir báðir lærarnir, Poul A. Eide og Petur H. Simonsen, søktu kommununa um loyvi at spæla badminton í fimleikahøllini í kommnskúlanum. Í januar 1958 fingu teir loyvi at spæla badminton og 15. januar varð felagið stovnað.

Í fyrstu nevndini sótu Poul Kjartan Bærentsen, formaður, Jens Petur Egholm, kassameistari, og Peur H. Simonsen skrivari. Longu 21. februar byrjaðu venjingarnar. Felagið hevði fingið tillutað 4 tímar fríggjakvøld og leygarkvøld, men longu ein mánað seinri fekk felagið 2 tímar afturat.

Í fyrstu kappingni hetta árið kappaðust 14 leikarar.

Limatalið vaks og tá nýggi háskúlin og nýggi nunnuskúlin vórðu bygdir fyrst í sekstiárunum fekk felagið eisini tímar í fimaleikahøllunum í teimum skúlunum. Tá stig vórðu tikin at byggja Ítróttar- og samkomuhøllina á Hálsi varð felagið millum tey virknu feløgini at savna pening.

Tað varð skjótt, at tað gjørdist ov trongligt í ítróttarhøllini, eftir at hon varð tikin í brúk í 1970. Felagið royndi at fáa hini feløgini at taka undir við eini ætlan at byggja upp í høllini á Hálsi, men bara Neistin tók undir. Tankin at fáa sína egnu høll kyknaði aftur, men ikki fyrr enn fyrst í áttatiárunum eydnaðist felagnum at byggja høllina i Gundadali, sum TórshavnarKommuna keypti frá felagnum fyrst í hesum árinum.

Miðskeiðis i sekstiárunum komu kappingar í regluliga legu við m.a. føroyameistarakapping og kappingum fyri yngri aldursbólkar. Seinri komu kvinnur eisini upp í kappingarnar. Fyrsti føroyameistari var Poul Michelsen.

Í 1971 fingu spælararnir fyri fyrstu ferð ein venjara, ein íslending, og sama ár vitjaðu 12 íslendskir spælarar í høvuðsstaðnum. Fyrsta millumlandakappingin var 19. mai hetta ár og árið eftir vitjaðu 11 spælarar i Íslandi.

So við og við gjørdust venjingarnar meiri skipaðar. Leikarar og venjarar fingu skeið heima og uttanalands og i fleiri skiftum hevur felagið saman við øðrum feløgum havt útlendskar venjarar. Í vetur er ein indari venjari.

Havnar Badmintonfelag hevur havt nógv virksemi seinastu árini og limatalið er omanfyri 300. Meiri enn 200 ung og elituspælarar venja regluliga, taka lut í kappingum kring landið og haraftuat spæla um 100 limir badminton á motiónsstigi. Felagið hevur havt góð úrslit við sigri á oyggjaleikum og ein spælari fyrireikar seg til olympisku leikirnar komandi.

Við tað at raksturin var tungur og trupult var at fáa eina hóskiliga rentu fyri lán, tí pantur fekst ikki í grundøkinum, sum kommunan eigur, gjørdi felagið og Tórshavnar kommuna fyrst í árinum sáttmála um, at kommunan tekur yvir høllina.

Eftir sáttmálanum skal høllin fyrst og fremst nýtast til badminton, og felagið ivast ikki í, at nýggju umstøðurnar verða til fram fyri badmintonspælið i Havnini.

Eftir aðalfundin í oktober er Kári Dal-Christiansen formaður í felagnum. Hann tók við eftir Bjørg Djurhuus, sum hevur gjørt stórt arbeiði fyri badmintonítróttina seinastu árini.

50-ára dagurin byrjar við eini kapping fyrrapartin í morgin. Klokkan 13 verður myndatøka. Klokkan 14 er alment hátíðarhald og framsýning og í annaðkvøld verður veitsla.



# ABC barnahjálp vitjan úr Liberia

**ABC barnahjálp hevur í døgunum 17. – 19. novembur vitjan av Matthew Sakeuh úr Liberia.**

BARNAHJÁLP

*Tíðindaskriv*

Týskvøldið og mikukvøldið í komandi viku fáa stuðulsforeldur og øll áhugað møguleikan at hoyra Matthew Sakeuh, leiðara fyri verkætlanini hjá ABC barnahjálp, greiða frá og vísa myndir frá arbeiðinum. Eisini verður møguleiki at tekna seg til vælgerðardøgurða.

Tiltøkini verða á Hotel Hafnia í Havn, mánakvøldið kl. 19.00, í Áarstovu í Havn (Yvirav cafe Nátúr) týskvøldið kl. 20.00 og í Kelduni í Skálafirði mikukvøldið kl. 20.00.

**Skrá:**

**Hotel Hafnia,**
mánakvøldið 17. nov. kl. 19.00:
Vælgerðardøgurði
Undir borðhaldinum greiðir Matthew Sakeuh frá og vísir myndir frá arbeiðinum. Familjan Carlsen syngur.
Døgurðin kostar 1000 krónur fyri hvønn.
Yvirskotið fer til verkætlanina hjá ABC barnahjálp í Liberia.
Tekning hjá Beintu Háberg Jacobsen á tlf: 220190.

**Áarstova í Havn,**
týskvøldið 18. nov. klokkan 20.00:
Matthew Sakeuh greiðir frá og vísir myndir frá arbeiðinum. Martin Joensen og Birgit Sivertsen syngja. Aftaná verður ein drekkamuður at fáa.

**Keldan í Skálafirði,**
mikukvøldið 19. nov kl. 20.00:
Matthew Sakeuh greiðir frá og vísir myndir frá arbeiðinum. Torkil Mørkøre, Tórhild Bjarkhamar og Birgit Sivertsen syngja. Aftaná verður ein drekkamuður at fáa.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Skrá fyri fundirnar:**

Áarstovu í Havn (Gamla Hotel Djurhuus, seinni Hotel Skarv yvirav cafe Nátúr) týskvøldið kl. 20.00:

Vælkomin
Martin Joensen syngur
Framløga, Matthew Sakeuh
Birgit Sivertsen syngur
Martin Joensen syngur
Fólk fáa høvi at seta spurningar
Drekkamuður

Keldan í Skálafirði, mikukvøldið 19. nov kl. 20.00:

**Vælkomin**
Tórhild Bjarkhamar syngur
Framløga Matthew Sakeuh
Birgit Sivertsen syngur
Torkil Mørkøre syngur
Fólk fáa høvi at seta spurningar
Drekkamuður